## Samanstoytur av kleyvarskapi

Tað var stutt sagt kleyvarskapur, tá tvær tvær danskar ferjur stoyttu saman í Oyrasundi í heyst. Tað var tjúkt í mjørka, tá skipini stoyttu saman, men Sjóferðslustýrið, sum hevur kannað tilburðin, vísir á, at einki samskifti var ímillum skipini, og at yvirmenninir á brúnni hildu ikki nóg væl eyga við útgerðini. Niðurstøðan er millum annað, at onnur ferjan átti at brúkt tokulúðurin, og at hin hevði ov nógva ferð í tí tjúkka mjrøkanum.

## Grønlendingar mugu bíða

Kanadiska fyritøkan Alcoa og norska fyritøkan Hydro hava víst áhuga fyri at byggja eitt aluminiumsvirki í Grønlandi, men enn hevur landsstýrið í Nuuk ikki gjørt av, hvussu verður við virkinum. Sivert K. Heilmann, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur við útvarpið í Nuuk, at málið skal viðgerast í vár. Skal eitt aluminiumsvirki byggjast í Grønlandi, er neyðugt at byggja tvey vatnorkuverk fyrst, og tí má fyrst gerast av, hvar verkið kann byggjast.

Borgarstjórin:

# Ynskir Strandferðsluni vælkomnari til Tvøroyrar



*Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at kommunan hevur bæði grundstykki og barnaansing til starvsfólk hjá SSl.*

**Kristin Michelsen borgarstjóri á Tvøroyri fegnast um avgerðina hjá landsstýrinum at flyta Strandferðsluna til Tvøroyrar**

STRANDFERÐSLAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hetta eru sera góð tíðindi, sigur ein fróur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri. Vit hava í fleiri ár bjóðað okkum til at hýsa Strandferðsluni, tí tað er púra natúrligt at hon liggur her suðuri, sigur hann, og vísir á, at her eru góðar og fastar almennar lønir, sum flyta til kommununa.

- Vit hava skip, kaj, pakkhús og farstøð, sum til ber at byggja uppí, sigur hann, og bjóðar starvsfólkunum hjartaliga vælkomnum til Tvøroyrar, um tey velja at flyta við suður.

- Vit hava ovmikið av grundstykkjum og góðar umstøður til barnaansing og skúlar. Bið tey selja húsini og taka milliónina við í lumman, so liva tey væl her suðuri við konum, monnum og børnum, sigur borgarstjórin á Tvøroyri. Hann heldur ikki, at Eg Havnar Kommuna hevur nakað ímóti hesum.

- Havnin hevur frammanundan ilt við at hýsa teimum, sum har búgva. Har eru bara trupulleikar av borgarunum. Nógvir bilar, høgir húsaprísir og vantandi barnaansing. Lat tey endiliga koma hendan vegin, her skulu tey vera hjartaliga vælkomin, sigur Kristin Michelsen, sum mangan hevur ilskast inn á politikararnir, tí teir tora ikki at leggja almenn arbeiðspláss út til útjaðaran.

- Vanliga mangla teir rygg til at leggja almennar stovnar út í útjaðaran. So hattin av fyri teimum, at teir gera hetta, sigur hann, og leggur skemtandi afturat, at:

- Valg verður skjótt. Skulu teir egna, so skal tað vera nú.

# Setið bara forboð móti at búgva í Havn!

**Poul Michelsen, løgtingslimur fyri Fólkaflokkin sigur onga meining vera í at flyta allan raksturin av Strandferðsluni til Suðuroyar, um endamálið bara er at upprætthalda arbeiðsplássini og at flyta pengar úr høvuðsstaðarøkinum.**

STRANDFERÐSLAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hóast flest allir politikarar taka undir við at flyta umsitingina av Strandferðsluni til Suðuroyar, so er fegnast Poul Michelsen, fyrrverandi borgarstjóri í Havn ikki.

- Skulu vit ikki bara siga, at tað skal vera forboðið at búgva í Havn? spyr hann.

Við Sosialin sigur hann, at í hansara hugaheimi átti endamálið at verið at minka um almennu útreiðslurnar. Í hesum sambandi átti raksturin av eindunum hjá Strandferðsluni at ligið hjá ruturnar eru, eitt nú, at nólsoyingar reka Rituna og suðuroyingar Smyril. Og eins og fleiri onnur hava sagt, so heldur fyrrverandi borgarstjórin í havn, at raksturin av Smyrli kundi verið umborð á skipinum.

Spurdur, um politiska skipanin ikki hevur skyldug til at flyta almenn arbeiðspláss út í útjaðaran, sigur hann, at tá skal grundgevingin ikki vera, at hjálpa smáu kommununum, men at rationalisera raksturin av almenna stovninum.

- Hetta minnir ikki sørt um tosið um útjavning millum høvuðsstaðin og útjaðaran. Í Reykjavík og Keypmannahavn var endin, at kommunurnar fóru á reyvina. Tað kostar at vera høvuðsstaður, men um alt skal flytast út, so verður onki eftir her, sigur Poul Michelsen.


## Den Kristne Ambassade i Jerusalem í Føroyum





**Í døgunum 1.-5. mars vitja umboð fyri donsku deildina hjá Den Kristne Ambassade i Jerusalem í Føroyum.**

**Sóknarpresturin Stig Christensen frá donsku deildini og fólk frá skrivstovuni í Keypmannahavn skipa fyri møtunum**

**Møti verða í hesum samkomum og kirkjum:**

**Hósdagin 1. mars kl. 20: Missiónshúsið í Vestmanna**
**Evni:** Ísrael eygnasteinur Guds

**Fríggjadagin 2. mars kl. 20: Oasan í Hoyvík**
**Evni:** Ísrael og endatíðin

**Leygardagin 3. mars kl. 16.30: Missiónshúsið í Skopun**
**Evni:** Jødiskar og kristnar veitslur

**Leygarkvøldið 3. mars kl. 19.30: Missiónshúsið í Skopun**
**Missiónsvika, talari:** Stig Christensen

**Sunnudagin 4. mars kl. 12.00: Tjørnuvíkar kirkja**
Veitslugudstænasta við luttøku av Kingo-kórinum og Stig Christensen sum talara.

**Sunnukvøldið 4. mars kl. 17.00: Lívsins Orð, Runavík**
**Evni:** Fikutræið: Lívsins træ, bannaða træið, vónarinnar træ

**DVD / video frá leyvsæluhátíðini í Jerusalem verður víst á fleiri av møtunum. Fólk frá øllum heiminum ferðast til Ísrael.**


# Eittans fráboðað ferðsluóhapp

Síðani í gjár hevur løgreglan einans fingið eina fráboðan um bilar, sum eru farnir út av vegnum í hálkuni. Av løgreglustøðini verður sagt, at einasta fráboðanin kom í gjárkvøldið, tá ein bilur var farin út av vegnum inni í Eysturoynni.

Hesin koyrdi norðureftir og var í millum Skipanes og Skálabotn, tá førarin misti tamarhaldi á bilinum og slongdist útav vegnum, so tað var um reppið, at hann ikki endaði í sjónum.

Sjúkrabilur kom á staðið, og førarin varð fluttur á sjúkrahús til nærri kanningar.

Annars var hált um stóran part av landinum í gjár, og eisini í dag er hált. Um hálkan var orsøkin til, at hesin bilurin var farin út av vegnum í morgun vita vit ikki. Tað visti løgreglan heldur ikki, tá vit spurdu í morgun.

Men hvussu er og ikki, so lá svarti BMW-bilurin niðan fyri vegin nakað sunnan fyri Hósvík seinnapartin í gjár.

**-rwd**



*Svarti BMW-bilurin lá niðanfyri vegin millum Hósvík og Landsfjósið seinnapartin í gjár*